 Vinnusíðurnar Vinnusíðurnar

## Íslendsk fiskasøla letur upp dóttir-felag í Kina

*B. Tyril / PRnewsMedia.com*

Tað íslendska fiskasølufelagið Icelandic Group hevur stovnað eitt nýtt dóttirfelag, Icelandic China, í býnum Qingdao. Stjóri í tí nýggja dóttirfelagnum er Hans Bragi Bernhardsson, sum fyrr hevur starvast við Íslands Sendistovu í Peking.

»Hans er væl kunnigur um tann kinesiska marknaðin og tosar flótandi kinesiskt,« sigur Icelandic Group í einum tíðindaskrivi.

Icelandic Group hevur í nøkur ár keypt vørur úr Kina og hevur samstarvað við kinesiskar fyritøkur innan framleiðslu av fiskavørum. Gjøgnum ta nýggju skrivstovuna í Qingdao skal hetta samstarv mennast víðari, skilst.

Icelandic Group Plc er eitt móðurfelag ið kontrollerar eitt altjóða netverk av framleiðslu og sølu fyritøkum innan fiskivinnu við fokus á frystan fisk.

# Royna eftir rækjum og keypa nýggjar trolarar til fiskarí undir Føroyum

**Reiðarin hjá Havborg tekur undir við at veiðirættindini hjá rækjuflotanum áttu at verið betri – samstundis investerar hann 55-60 milliónir í tveir nýggjar trolarar sum verða leveraðir í juni**

FISKIVINNA
*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*


*Rækjutrolarin Havborg roynir í løtuni við Svalbard*
*Foto: Maria Olsen / PRnewsMedia.com*

Rækjuskipið hjá leirvíkingum, Havborg, er til fiskiskap við Svalbard har tað gongst hampiliga væl sambært reiðarínum. Samstundis verður roknað við at teir báðir nýggju trolararnir sum reiðaríið byggir í Íslandi, verða leveraðir í juni.

»Havborg fór til fiskarí fyri umleið trimum vikum síðani og tað hevur higartil gingið hampiligt,« segði Tummas Justinussen, reiðari. Nær teir fjúrtan menninir kunnu rokna við at sleppa heim aftur hevði hann tó einki boð uppá. Hinvegin læt hann skína ígjøgnum at hann tekur undir við nógvum av tí sum rækjuvinnan hevur ført fram í seinastuni viðvíkjandi støðuni í rækjuvinnuni og mistum veiðirættindum.

»Nú er Havborg okkara fyrsta roynd í rækjuvinnuni so vit kunnu ikki tala so nógv vegna hesa vinnuna,« segði Tummas Justinussen. »Men eg kann væl fylgja hugsanini um at rækjuflotin er burturúr ringast fyri í okkara fiskiflota hvat veiðirættindum viðvíkur – uttan mun til hvør ið eigur skuldina av at so er. Hvussu er og ikki, tað er ringt at skylda upp á onnur enn okkum sjálv fyri støðuna sum er íkomin; hetta sjálvsagt í kombinatión við teir vánaligu prísirnar á rækjum.«

»Tak til dømis Grønland, bæði á eystur- og vestursíðuni… Tað er føroyingar ið grundløgdu og bygdu upp rækjuvinnuna har – og har eru framvegis nakrar av teimum bestu fiskileiðunum sum vit hava mist øll rættindi til. Hetta má onkursvegna kunna fáast í rættlag aftur.«

Tummas Justinussen rekur saman við pápa sínum Osmundi Justinussen og øðrum reiðaríini Havborg, Sæborg og Polarstjørnan. Umframt rækjuskipið Havborg umfatar virksemið trý fiskiskip ið royna undir Føroyum.

Um góðar tveir mánað koma so tveir nýggir trolarar, Stjørnan og Polarhav, sum eru bygdir í Íslandi; teir lasta 100 tons hvør og kosta góðar 55-60 milliónir tilsamans. Í vár 2003 seldu leirvíkingarnir Polarhav og Stjørnuna til Sørvágs við loyvum, og keyptu ístaðin Akraborg og Varðborg við loyvum; hesir vórðu tó lagdir umframt trolarin Brilliant, og tey trý veiðiloyvini verða so umsett til teir báðar nýggju trolararnar.






Bilar
Nr. 76 • hósdagur • 22. apríl 2004 • 78. árg.


*Lyfta v. Eyðun Egholm í Havn er nú blivin ein føroysk deild hjá donsku fyritøkuni Nordjysk Lift A/S í Hjørring. Í hesum sambandi er Eyðun blivin starvsmaður hjá Nordjysk Lift, við ábyrgd av føroysku deildini*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Lyfta v. Eyðun Egholm:

# Leiga arbeiðstólini heldur enn at eiga tey

**Nú ber til hjá arbeiðstakarum og privatfólki at leiga sær arbeiðstól til uppgávur sum annars krevja nógva arbeiðsorku ella stórar íløgur. Fyritøkan Lyfta v. Eyðun Egholm í Havn er nú blivin ein føroysk deild hjá donsku fyritøkuni Nordjysk Lift A/S í Hjørring**

LYFTUVOGNAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Fyritøkan Lyfta v. Eyðun Egholm í Havn er nú blivin ein føroysk deild hjá donsku fyritøkuni Nordjysk Lift A/S í Hjørring. Í hesum sambandi er Eyðun blivin starvsmaður hjá Nordjysk Lift, við ábyrgd av føroysku deildini, sum enn eitur Lyfta. Hetta má sigast at vera eitt spennandi og nýskapandi tiltak.

Vit skulu vera amboðsdeildin hjá arbeiðstakarum í Føroyum, sigur Eyðun Egholm frá fyritøkuni Lyfta, sum hevur specialiserað seg í at leiga út arbeiðstól í ymiskum støddum frá 200 gr. til 22 tons ella meira.

Eyðun, sum fyrr var annar av eigarunum í elfyritøkuni El & Tele, sigur, at hann í teirra arbeiði sá, at tørvur var á eini fyritøku, har arbeiðstakarar og privatfólk kundu leiga sær arbeiðsamboð til tær ymisku arbeiðsuppgávurnar, hann hugsaði tá serliga um lyftir og lyftivognar.

Tað kann til dømis vera privatmaðurin, sum skal mála sær húsini ella gera ábøtur har tað fleiri staðir er ringt og óhøgligt at koma til. Ella tað er arbeiðstakarin, sum skal byggja eina høll. Líkamikið hvat uppgávan er, so ber til at leiga sær arbeiðsamboð til ta ávísu arbeiðsuppgávuna.

Fólk kunnu t.d. leiga sær ein lyftuvogn og sjálvi brúka hann, bert skulu tey ansa eftir at vognurin stendur á vegi ella føstum undirlagi, og annars fáa neyðuga vegleiðing.

Lyfta virkar sum ein deild hjá Nordjysk Lift A/S í Føroyum. Stjóri er Per Nielsen í Hjørring. Alt bókhald verður gjørt á høvuðsdeildini í Hjørring, haðani eisini rokningarnar verða útskrivaðar og sendar beinleiðis til kundarnar í Føroyum.

### Meira enn 1.000 ymisk sløg

Nordjysk Lift A/S ráða yvir meira enn 1.000 ymiskum sløgum av arbeiðstólum, sum teir leiga út til entreprenørar, byggifyritøkur og privatfólk í øllum Danmark og nú eisini í Føroyum

Nevnast kann t.d. at teir vóru høvuðsleverandørar av lyftum og teleskoplessarum tá Parkin í Keypmannahavn bleiv innilokað. Teir hava fyrr leigað amboð til Føroyar.

Teir hava m.a. trukkar, gravimaskinur, blandimaskinur, betonfresarar, betonslíparar, skeriamboð, brekkarar, stein-flísa-grótskeriborð, stillads, og lyftir upp til 48 metra hædd til leigu.

Eyðun sigur, at hetta samstarv gevur fleiri møguleikar, og úrvalið verður nógv størri.

Handverkarar og byggifyritøkur hava tikið væl ímóti hesum tilboði, nú sleppa teir frá at gera íløgur í arbeiðsamboð, sum teir annars ikki so ofta hava brúk fyri.

Eisini sleppa teir undan at brúka tíð og orku upp á at seta stillads upp, um teir heldur leiga ein lyftuvogn.

Fólk, sum biðja ein handverkara til eina ávísa arbeiðsuppgávu, skulu ikki gjalda óneyðugar arbeiðstímar fyri skeiv ella manglandi amboð. Nú kunnu tey fáa júst tey amboðini, sum hóska til ta ávísu arbeiðsuppgávuna.

Lyfta A/S, heldur til í Fjalsgøtu 13 í Havn, og telefonnummarið er 503150. Hetta er til onnur hølir eru útvegaði.

Ein høll skal byggjast til at hýsa virkseminum hjá fyritøkuni, og gongst sum ætlað verður tað verðuleiki innan eitt ár, sigur Eyðun Egholm.

## Framleiðslan av VW Touran



Sølan av VW Touran gongur so gott, at bilarnir nú eisini verða framleiddir leygardag. Møguliga verður eisini neyðugt at byrja náttina til mánadag

*Kelda: Motor Magasinet*

## GM met-yvirskot



General Motors trífaldaðu samlaða vinningin í 2003 til meira enn 2, 6 milliardir krónur

*Kelda: Motor Magasinet*

## Honda í Thailandi



Honda arbeiða við eini verkætlan um at gera ein bil í Thailandi. Íløgan er ein milliard krónur, og bilurin kemur á marknaðin í 2007

*Kelda: Motor Magasinet*